# Útboð av EL-bilum

**Landssjúkrahúsið skal keypa seks nýggjar EL-bilar**

Bilarnir skulu nýtast í sambandi við at m.a. starvsfólk frá økispsykiatriini koyra út til borgarar kring landið.

**Bilarnir skulu í størstan mun lúka hesar treytir:**

- Skulu vera elbilar (góðar 400 km WLTP).
- Støddin á bilunum skal í minsta lagi vera í "Polo"-klassanum.
- Fýra vaksin skulu kunna brúka bilin (4 hurðar).
- Skulu hava ein myrkan, neutralan lit – gráir/svartir.
- Skulu hava tónaðar rútar aftan.
- Skulu kunna leverast skjótast gjørligt, tó í seinasta lagi í januar 2025.
- Skulu vera egnaðir til at koyra millum bygdir í øllum veðri.
- Skulu hava eyka sett av felgum við vetrardekkum

**Vekting:**

- Prísur vektar 65% og koyrieginleikar, komfort, praktiskt nýtsluvirði, góðska og útgerð vekta 35%
- Førarin av bilinum metir um koyrieginleikar, komfort, praktiskt nýtsluvirði, góðsku og útgerð.

Tilboðini skulu vera greið og væl útgreinað, tvs. prísir við og uttan meirvirðisgjald.

Landssjúkrahúsið ynskir at royna bilarnar áðrenn avgerð verður tikin.

**Freistir**

| **Freist** | **Hending** | **Viðmerking** |
|---|---|---|
| 11. november | Útbjóðingin verður kunngjørd á Keypsportalinum | |
| 15. november | Møguleiki er at avtala tíð at síggja bilarnar | Tíð kann bíleggjast hjá Inga Mittún, tlf. 211800, teldupost im@ls.fo |
| 25. november | Spurningar og svar | Spurningar skulu vera skrivligir og skulu sendast til Fróða R. Petersen á frope@ls.fo. Skjal við svarunum verður lagt á Keypsportalin. |

| | | |
|---|---|---|
| 27. november kl. 15.00 | Tilboð skulu vera inni | Tilboð skulu sendast við telduposti til Inga Mittún, deildarstjóra á Landssjúkrahúsinum, á im@ls.fo. |
| 2. desember | Tilboð verða viðgjørd | |
| 2. desember | Vinnarin verður kunngjørdur | Landssjúkrahúsið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. |